Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)
(Barnafrádráttur til sendifólk og umskipaður pensjónistafrádrátttur)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 10. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 1, 1. pkt. verður aftan á "tilhald í Føroyum" sett: "ella hevur tilhald uttanlands sum sendifólk".

2. § 3, stk. 4 verður orðað soleiðis: "*Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein frádrátt á upp til 6.000 kr. um árið."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024.

Samtykt á Løgtingi hin 23. november 2023 við 25-0-4 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI 23. november 2023

stjóri

LM-019/2023